## DAGSINS MEINING

# Nýggj vinnugrein

Íslendingar, sum í so mongum verða brúktir sum fyrimynd fyri menning hjá lítlari tjóð, hava í mong ár ment sína egnu flogvinnu og eiga í dag stórt tal av flogførum og útbúnum flogskiparum, sum virka kring allan heimin. Spurningurin er í hvønn mun vit føroyingar kunnu gera íslendingum hetta eftir.

Hyggja vit at gongdini í Føroyum so er ótrúliga nógv hent á flogvinnuøkinum longu. Atlantsflog hevur ment sítt virksemi nógv eftir bara fáum árum og eigur í dag fleiri fløgfør. Felagið hevur fingið leigusáttmálar í útlandinum, sum muna nógv og sum ikki minst geva okkum góðar royndir at byggja víðari á.

Í blaðnum í dag mælir flogvinnumaður til, at vit føroyingar ganga somu leið sum íslendingar og fara miðvíst undir at útbúgva flogskiparar, sum kunnu gerast grundarlagið undir eini heilt nýggjari útflutningsvinnu. Hann heldur tað ikki vera skeivt at seta sær sum mál eftir so og so nógvum árum at útbúgva einar 100 til 200 flogskiparar, sum so aftur kunnu gerast eitt gott íkast til samfelagsbúskapin.

Hyggja vit at gongdini seinastu árini, so hava fleiri ungir føroyingar valt at gerast flogskiparar, og okkurt bendir á, at hetta fer at vinda uppá seg. Herfyri varð kunnandi fundur í Havn, har donsk fyritøka beyð sær til at útbúgva føroyingar til flogskiparar. Hetta er tó ein sera kostnaðarmikið útbúgving og slíkum føri stingur spurningurin seg upp um ikki vit áttu at havt ein serstakan grunn, sum stuðlaði útbúgving av flogskiparum fyri á tann hátt at ment hesa vinnugrein. Rættiliga nógv ung fólk komu til kunnandi fundin, sum varð hildin í Miðlahúsinum og sambart fyrireikarunum, er áhugin stórur millum føroyingar at útbúgva seg til flogskipara. Vit eiga so eisini sum er royndar og góðar flogskiparar, sum kunnu vera góð fyrimynd hjá unga ættarliðnum og sum kunnu geva teimum íblástur.

Í eini tíð har tosað verður um at fáa samfelagnum fleiri bein at standa á vil tað vera heilt náttúrligt at taka henda vinnumøguleikan við, ikki minst nú vit hava tvey føroysk flogfeløg, sum aftur kunnu vera karmurin um og inspiratorurin til at fáa føroyingar at velja hesa vinnuleiðina. Við einum flogvinnuumhvørvi her heima, sum er í menning og sum vil út um landoddarnar eisini, er tað einki annað enn náttúrligt, at vit nú fara at seta fokus á hetta at útbúgva bæði flogskiparar og flogternur í størri mun – bæði til tess at nøkta egnan tørv men eisini til at kunna fara út í heim at fáa arbeiði, royndir og forvinna pening. Vit hava nú í mong mong ár víst vilja og hegni til at manna brúnna á stóru handilsskipunum. Framtíðin fer at vísa, um hesin vilji og hetta hegni eisini verður at síggja á "brúnni" á flogførum kring heimin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Endiliga kom hann - veruleikin um flogvøllin

**NAPOLION MAGNUSSEN**
Miðvágur



Mundi dottið á gumpin tá eg las hasa greinina hjá Alfred Olsen um flogvallakanningarnar. Havi síðani fyri tað mesta flent innantanna eftir, hvat tað er fyri fólk vit hava sitandi á tingi, sum kemur við sovorðnum tvætli á skrift. At siga at kanningar frá 1966 eru betur undirbygdar enn kanningar nú á døgum. At siga at eitt úttalilsi hjá Jens Otto Kragh er eitt serfrøðingaúttalilsi? At hann var flogvallaserfrøðingur visti eg ikki av, og avgjørt ikki at hann var flogvallaserfrøðingur við innliti í føroyskum viðurskiftum.

Tankarnir runnu beinan vegin aftur til seinasta ár, tá hann við sínum fjákuta smíli í SVF forsvaraði keypi av Vesturvón sum gott vinnulívshegni, har onkur, møguliga við inside vitan sum nevndarlimur í einum íløgubanka, sum tjóður á nátt keypti gimsteinin úr Sørvági.

Nú er tað so sligi fast, at flogvøllurin helst á liggur best egnaða staði í Føroyum, møguliga er Søltuvík líka væl egna.

Einki sjokk fyri meg, tí bretar hava neyvan av tilvild valt sær Vágarnar sum eina høvuðsstøð. Teir vóru vanir við at etablera seg í kríggi, og vóru ivaleyst eisini betri serfrøðingar enn Jens Otto Kragh, uppvaksin uttan eitt einasta fjall sum danir flest. Einasti veruligi turbulensur, teir kenna til er helst frá einum hárturkara.

Og heldur einki sjokk, at bæði Skorðhædd og Glyvursnes eru óegnað. Skorðhædd liggur nakað sum Stóra Dímun, høgt frá slættlendinum og niður á sjógv á báðum síðum, sum skapar nógvan turbulensi. Og Glyvursnes? Ja, hvat skal ein siga. Poul Michelsen leigaði eitt flogfar at gera kanningar tá hann var borgarstjóri í Havn. Tað stóð, ja Gud viti hvussu leingi, í Vágum og fekk ongar kanningar gjørt, tí ikki var flúgvandi yvir Glyvursnes í nógvar dagar. Og fyri 5 ella 6 árum síðani, minnist eg rætt, sóu vit-apassarnir á Borðuni ikki Glyvursnes í fleiri vikur fyri mjørka. Ikki tí mjørki var á Borðuni, nei har hoyggjaðu teir av grimd. Longur suðuri ber til, sigur Tórshavnar kommuna nú. Vælsignaðir, gangi tykkum ikki útav har suðuri í mjørkanum.

Eftir stendur Søltuvík. Har sær út til at verða onkur møguleiki. Eri ikki staðkendur har, men eg síggi fyri mær, at tær keðiligu ættirnar í Vágum eisini eru keðiligar har, Søltuvík liggur líknandi í mun til mjørkaætt á flogvøllinum. Men tað kunna kanningar staðfesta, um so er, við at seta sama slag útgerð á flogvøllinum og Søltuvík og samanlíkna úrsliti. Men tosa vit um kostnaðin skula hesar kanningar peika rættiliga langt frá hvørji aðrari fyri at hetta skal loysa seg, tað er so eingin ivi um.

So, landsins kosnu menn. Her er einki at bíða við. Seti gongd á leingjanina av flogvøllinum, tí 300 milliónir eru einki í mun til tær báðar milliardirnar, ið ein nýggj flogvallarloysn kostar. Vit hava bíða nóg leingi og eingin grund er at draga tað me2ira út.

Og hvør veit, kanska Alfred eisini stemmar fyri, tí sum flogvallaserfrøðingurin Jens Otto Kragh segði: "Man har et standpunkt indtil man får et nyt"

Og so eitt hjartasuff: Alfred roynir tross alt at verða eitt sindur lokalur, men hvar eru vágatingmennirnir, Jørgin og Marjus? Hoyri einki til teir, hvørki í hesum ella nøkrum øðrum máli, Vágunum viðvíkur. Hví royna tit ikki at fáa okkurt til Vágarnar, kanska at fáa selt Atlantsflog til vágafólk,, eins og eitt nú JFK bleiv selt til klaksvíkingar, Fiskavirking til leiðsluna og onnur. Vísi tykkum sum menn og slíti samgonguna um hon ikki makkar rætt í flogvallarmálinum, heldur enn eitt nú at leggja kommunur undir at taka alt ov nógvan skatt inn.

Vit hava brúk fyri sjónligum tingmonnum ALT valskeiði, ikki bara upp undir val, har reksa verður upp hvat "VIT HAVA GJØRT...". Tingmenn, ið síggja ábyrgdina í starvi sínum og taka við størri álvara enn borgarin hevur fatan av.

# Viðmerking til oddagrein í Sosialinum týsdagin 8 mai

**NAPOLION MAGNUSSEN**
Miðvágur

At Pætur Rasmussen er serfrøðingur innan flogvinnu er eingin ivi um, hann er helst tann besti í landinum innan marknaðarføring v.m. og hevur sera stóra vitan innan tað økið. Men um hann er serfrøðingur innan staðseting av flogvøllum loyvi eg mær at ivast í, og hann nevnir tí heldur onki um tað í samrøðuni.

Góði blaðstjóri. Glyvursnes kann ikki brúkast og Skorðhædd kann ikki brúkast. Tað er staðfest veruligum serfrøðingum innan staðseting av flogvøllum. Og tá eru ongar mjørkakanningar við!

Góði blaðstjóri. Royn, sjálvt um tað er ringt tá ein er so lokalur, ikki at verða so subbjektivur. Tú skal jú skriva tað í oddagreinina sum er sannleikin, ikki blendaður av tíni egnu meining, og sum er beinleiðis ímóti teimum verðuligu serfrøðingunum. Tað eigur lesarin at kunna forlanga av einum blaði, sum ikki er eitt lokalblað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.